# Barnafestivalur í Silvalandi

**Hoppiborgir, gullgravarar, ponyríðing og kandiserað súrepli. Børnini høvdu sítt at fáast við, meðan foreldrini nutu tonleikin á SummarFestivalinum**

SUMMARFESTIVALUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Uttan at taka nakað frá øðrum festivalum, so er SummarFestivalurin meira enn nakað eisini ein familjufestivalur.

Silvalandið á Akursmørk hevur øll árini verið garanturin fyri, at eisini børnini fáa sítt burtur úr festivalinum, og aftur hesa ferð eydnaðist tað fyriskiparunum at skapa eitt barnaland, sum var bæði størri og meira fjølbroytt, enn tað áður hevur verið.

Tað er sjálvandi avmarkað, hvussu nógv nýtt kann stáplast upp á beini til slíkt barnaland. Men tað má sigast, at innilokaða hoppiborgin er ein genial uppfinning. Vit búgva jú í Føroyum, og tá verðurgudarnir onkursvegna hava fingið nakað ímóti SummarFestivalinum – sjálvt um veðrið var so heilt hampuligt hesaferð – so er ein innilokað hoppiborg rættiliga smart. Og at hava ein tónleikapall burtur av til Silvalandið, var eisini eitt reint plettskot. Eitt plettskot, sum bæði skapti hugna, men sum so sanniliga eisini man vera ein rimmar uppliving hjá føroyskum tónleikaspírum, ið helst hava framførslu á stóra pallinum sum ein av heilt stóru framtíðardreymunum.

Og so var tað annars andlitsmáling, ponyríðing, tarvar og gullvasking fyri allar pengarnar. Enntá uttan at foreldrini máttu leita sær djúpt í lumman fyri hvønn stuttleikan.







